# Mikaela 60 ár



Mikudagin 20. januar 2010 gjørdist Mikaela D. Højgaard, Tórshavn, 60 ár.

Mikaela er fødd 20. januar 1950. Foreldur hennara vóru Kamma og Jógvan Debess á Tinghúsvegnum í Tórshavn.

Í 1968 giftist hon Hanusi Højgaard, sonur Louis og Ásu Højgaard, Yviri við Strond í Tórshavn, og saman eiga Mikaela og Hanus 4 børn, Louis, Maiken, Jógvan og Hanus. Ommu- og abbabørnini eru 8 í tali.

Mikaela hevur í mong ár starvast á lønardeildini á Landssjúkrahúsinum.

Dagurin verður hildin leygarkvøldið saman við familjuni í heimi teirra Yviri við Strond.

Vit ynskja Mikaelu hjartaliga til lukku við degnum og takka henni hjartaliga fyri alt tað, hon er fyri okkum øll.

**Børn og svigarbørn**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Reynhold Nielsen** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 18 í Salem. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Reynhold, kunnu lata Salem eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Hjalti Joensen, Hvannasund**, fer til gravar úr Hermon í Norðdepli, fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Hjalta, kunnu lata Hermon eina peningagávu, konta í Norðoya Sparikassa.

**Jógvan av Kák, búsitandi í Ålborg, ættaður úr Havn**, andaðist 21. januar, 48 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

# Minningarorð um Frank Dam

**f. 13.01.1950 - d. 20.10.2007**

13. januar í ár hevði Frank kunnað hildið sín 60 ára føðingardag, men soleiðis skuldi ikki verða. Hervilig sjúka, ið skjótt fekk yvirtakið, rakti hann, og lívið fjaraði spakuliga burtur. Frank andaðist 57 ára gamal tann 20. oktober 2007.

Frank vaks upp í Sandavági, var sonur Elias og Helgu Dam og elstur av trimum systkjum. Hann fór sum ungur til sjós og sigldi í nógv ár sum maskinmeistari, og eitt sum eyðkendi hann, vóru hansara góðu hendur til hetta arbeiði. Evnini á hesum økinum komu eisini til sjóndar, tá hann seinni keypti sær bát og gjørdist útróðrarmaður. Báturin, hann keypti, var í ringum standi, men tá Frank var liðugur at umvæla, var hann sum nýggjur. Frank arbeiddi eisini á landi, m.a. var hann í fleiri ár hjá J.K. Joensen & soni.

Á yngri árum var Frank ítróttarmaður. Hann róði kapp, spældi fótbólt og var ein framúr góður hondbóltsmálverji.

Frank giftist Jónu úr Miðvági, og bygdu tey sær hús í Miðhjøllum í Sandavági. Frank og Jóna fingu 4 børn - Tórdis, Oddmar, Helgu og Eyðstein.

Saknurin eftir Frank er stórur, og torført er at fylla út tómrúmið eftir hann. Serliga minnast vit Frank fyri hansara hjálpsemi og ikki minst hansara skemtiligu viðmerkingar.

Friður verið við minningum um Frank.

**Systkini**
**Elly og Martin**



Nú ert tú farin, komin heim
til Jesuspápa tín,
har pína tyngir teg ei meir,
men frið í sál og sinn.

Ja saknurin er stórur nú
mítt hjarta grætur svárt,
ei meir eg smíli títt skal sjá
her jarðar foldum á.

Vit, systir bróður, heilsa tær,
tøkk fyri tað tú gav.
Vit aftur skula møtast har,
tá foldarlív er av.

Tú friðin hevur funnið nú
fært hvíld við Jesu bróst.
Hann ansar tær, í himla bú
har alt er gott og ljóst.

So nú vit siga tær farvæl
ei fyri síðstu ferð,
tí okkar' reisa koma skal,
ein dag vit møtast glað.

Mín góði bróðir eitt eg veit,
at saknur stórur er,
hjá mammu, konu, børnum kær,
tú besti vinur var.

# Tøkk

Hjartaliga vit øllum, sum á ymiskan hátt hjálptu og sýndu samkenslu, tá okkara elskaða kona, mamma og omma

**Hanna Elena Waag Jacobsen**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Annu Mariu og Fróða Nyby fyri alt, sum tit vóru fyri okkum, tá vit komu heim til Føroya.

**Árni**
**Súsan, Elin og Oddmar**

# Tøkk

Øllum tykkum, sum mintust meg á 60 ára føðingardegnum tann 7. november 2009, takki eg hjartaliga.

Somuleiðis takki eg børnunum við familju, sum gjørdu dagin so væleydnaðan.

**Heilsan**
**Óli A. Johansen, á Tanganum, Tvøroyri**

# Tøkk

Eg takki hjartaliga øllum tykkum, sum komu at vitja, og somuleiðis takki eg fyri blómur og gávur, sum eg fekk á mínum mínum 75 ára føðingardegi 9. januar.

Hjartans tøkk til øll tykkara, sum hjálptu til, soleiðis at vit fingu ein góðan dag.

**Vinarliga**
**Johannes Simonsen**